

*Húsini á Kletti*



*Á hesi vanlukku ferðini norður í Funningsbotn var Anna Sofía saman við Onnu Louisu, sum slapp undan smittu. Her her hon saman við mannininum Joan David, beiggja Marin í Mortanstovu og børnum teirra Zakarias Karl, Lauru og Jacobinu, sum er kelda til søguna um jólatræið í 1911*



*Absalon og Petra í Tjørnustovu*

Norðagøtu hesa vanlukku vitjan, kundi hon hvørki koma manni ella børnunum nær. Frammanfyri húsini á Brúnni stóð leingi ein hella. Har varð matur settur, sum hon so kundi heinta.

Anna Sofía átti fimm børn, og tað yngsta var ársgamalt. Og hvat skuldi ein fiskimaður gera við fimm børnum? Tey flestu fóru út til onnur at vera. Høgni fór til Syðrugøtu til Eiðis Hans Jakku, sum var vaksin upp á Blásastovu. Lisa fór í Blásastovu. Johannes fór til ætt í Lorvík at vera. Marsanna fór til Miu, mammu Hans Jacob Havstreym, at vera, og sonurin Jógvan Martin bleiv verandi á Kletti. Her býr sonurin John nú.

Um húsini á Brúnni er at siga, at tann, sum bygdi tey, var Sámal Petur Joensen. Hann doyði við Tulip, og tað var lítið, og einki hann kom at vera í egnum húsum.

Tey, sum hava búð har í nýggjari tíð, eru Hansina, f. Øregaard úr Lorvík og Jóan Jakku, sum var systirsonur Sámal Petur. Jóan Jakku var ommubeiggi Sigfríð Joensen, sum hevur skrivað bókina um Gøtuskeggjar. Hansina var ommusystir Petru, konu Sigfríð.

Hesi húsini eru nú summarhús hjá ættini.

## Tjørnustova

Tjørnustova er annað hús norðanfyri Blásastovu. Fyrr er greitt frá ættarsambandinum millum stovurnar báðar.

Ein grein av søguni hjá hesum húsi byrjar í 1727 í Leirvíksfirði. Ein bátur av Blankaskála sakk Lorvíksfirði, og fleiri druknaðu. Millum teirra var Niclas Petersen úr Lykkerhúsi, einum av teimum fýra húsunum á Blankskála.

Niclas var trúlovaður Elsebeth Hansdatter úr Fuglafirði. Hon fekk eftir vanlukkuna eina dóttir, sum varð doypt Sunniva Niclasdatter.

Sunniva giftist í 1764 við Ísak Joensen í Heimistovu í Fuglafirði. Hann var 16 ár yngri enn hon.Tey fingu fimm børn. Eitt av teimum var Elsebeth Isaksdatter, f. 1767. Hon giftist við Jákupi Heinesen, bónda í Guttastovu í Leirvík. Tey fingu seks børn. Tað elsta var Anna Jacobsdatter, f. 1794. Hon giftist við Óla Jacobsen, bónda í Tjørnustovu í Norðragøtu. Ein onnur dóttir var Sunneva Jacobsdatter, sum giftist við Høgna Jacobsen, sum var beiggi Óla. Tey búsettust í Leirvík, og nógv av teimum, sum eita Høgnesen eru ættað frá teimum.

Anna og Óli áttu 8 børn. Sunnuva og Høgni áttu 5 børn.

## Trý systkin eftir í Tjørnustovu

Tað vóru fimm av teimum átta børnunum hjá Onnu og Óla Jacobsen, sum fluttu til Skúvoyar, soleiðis sum vit fyrr hava greitt frá. Hetta skapti eitt serligt samband millum Gøtu og Skúvoy, og onkur stuttlig søga er í tí sambandinum.

Í Skúvoy høvdu teir eitt hav, sum eingin í oynni orkaði at lyfta. Men einaferð gøtumenn komu suður royndu teir havið og syftu tað sum einki. Morgunin eftir var havið horvið. Skúvoyingar skuldu ikki hava, at slíkt endurtók seg. Sjálvsagt verður henda søgan avnoktað í Skúvoy!

Nú fimm systkin vóru farin til Skúvoyar vóru bert trý systkin eftir í Tjørnustovu. Tey vóru:

1. Jacob Olsen, 1817-1896, tekur við sum bóndi. Hann var giftur við Siggu Malenu Jacobsen, úr Garði í Lorvík. Ein av hansara synum var Jákup, kallaður Gøtu Jákup í Klaksvík, sum nú var borin til garðin, eftir at beiggi hansara Óli Jákup var gingin burtur við báti í 1884. Men hann valdi heldur at búsetast Millum Garðarnar í Klaksvík, og hann gjørdist ættarfaðir til eina sera stóra ætt, sum millum mong onnur telur Ziska Jacobsen, sum bjargaði teimum á Ernestinu í 1930. Hetta er helst størsta bjargingarbragdið í Føroya søgu. Ein annar eftirkomari er Steinbjørn Jacobsen, borgmeistari í Klaksvík.

Tann næsti beiggin Absalon tekur so við garðinum. Tað var sonur hansara Óla Jákup, sum giftist við Elspu Sofíu av Skipanesi.

Ein beiggi Absalon var Petur Pauli. Hann var ein av teimum, sum var við Waagen ta tiltiknu ferðina í 1888, tá ið Waagen var á veg heim úr Íslandi við 150 útróðrarmonnum, og teir mundu gingið burtur. Húsini hjá Petur Paula vóru í gerð, men veðrið var so ringt, eisini í Gøtu, at húsini fóru í luftina. Hetta varð eitt rættiligt bakkast, og í staðin máttu Peter Pauli byggja eina kroysu uppi á Fløtti. Kona hansarara Emilja, ættað úr Barbustovu, doyði í barsilssong, og børnini fóru í ymsar ættir. Tvey børn Elin og Johannes fluttu til Lorvíkar, og frá teimum eru kendar ættir har í bygdini.

Ein systir, Anna, giftist til Fuglafjarðar við Eliesar í Beiti. Tveir synir hjá teimum fóru av landinum. Óli Jákup fór til Canada og doyði ungur. Hildið hevur verið, at hann doyði í stóru eksplosióni í Halifax í 1918, men hetta hevur ikki fingist váttan fyri. Einki samband er við tað ættina. Bartal fór til Bretlands og giftist har. Har er samband við ættina, og hevur eina langabbasonur vitjað her í summar.

2. Ein systir, sum var eftir í Norðragøtu, var Anna Lovisa, f. 1824, sum giftist við Johannes Nicolaj Joensen (1822-1905) í Mortanstovu. Tey vóru foreldur til Onnu Katrinu Johannesen (1855-1898), sum giftist við Zacharias Zachariassen (1854-1921). Hann var ættaður úr Jákupsstovu og giftist inn í Mortanstovu. Tá ið hann gjørdist einkjumaður, giftist hann aftur við Marin.

Dóttir hansara, Anna Louisa, giftist við beiggja Marin, Jóhan David. Tískil giftust faðir og dóttir við tveimum systkjum.

Ein onnur dóttir Onnu Louisu var Johanna Johannesen (1860-1935), sum giftist við Joen Frederik Gøthe (1854-1941). Tey vóru foreldur Nicolinu, sum giftist við Amaliel hjá Petur Jakku.

3. Ein onnur systir var Súsanna fødd í 1828. Hon giftist við Símuni Heinesen, á Brúnni, sum eisini var í sama túni. Beiggi Símun, Justines, gjørdist ein av niðursetumonnunum á Skipanesi. Ein av hansara eftirkomarum gjørdist gitni danski fótbóltsspælarin Frank Arnesen, soleiðis sum tað hevur verið greitt frá í røðini "Hendur ið Sleptu" í Sosialinum.

Ein abbasonur Símun var Jákup Simonsen, sum var lærari í Gøtu alt sítt lív. Beiggi hansara Símun var somuleiðis lærari í Nólsoy alla sína tíð.

**Komandi partur**
Í komandi parti fer Tórir til skips. Tá greiðir hann millum annað frá útróðrartúri tann dagin í 1944, tá ið gøtubátur gongur burtur á Gøtuvík, og tríggir mans drukna.